Heystting við evninum:

## "Havrættarsáttmáli Sameindu Tjóða og krav føroyinga um landgrunsrættindi út um 200 fjórðingsmarkið"

**Vit bjóða til heystting 29. september 2004 kl. 19.00 á Hotel Føroyum**

*Sigmundur Ísfeld á Løgmansskrivstovuni og Martin Heinesen á Jarðfrøðisavninum greiða frá arbeiði teirra, ið kann vísa seg at fáa stóran týdning eisini fyri framtíðar oljuleiting kring Føroyar.*

Kl. 19.00 Vælkomin
Kl. 19.30 Formaðurin setur Oljutingið
Kl. 19.35 Umboð fyri ENSK samtakið (El-Service, Normek, Sandblásing & KJ-Hydraulik) greiða frá teirra framtíðarætlanum innan oljuvinnuna v.m.
Kl. 19.50 Sigmundur Ísfeld greiðir frá arbeiðinum at seta í gildi Havrættarsáttmála Sameindu Tjóða
Kl. 20.05 Martin Heinesen greiðir frá arbeiðinum viðvíkjandi møguligum landgrunskrøvum Føroya í Norðurhøvum og á Hatton-Rockall leiðini
Kl. 20.30 Spurningar frá áhoyrarum
Kl. 20.40 Matur og drekka

***Samtakið ENSK spf stuðlar tiltakinum.***

Vinarliga boða Vinnuhúsinum frá luttøku á telefon 311864 ella umvegis teldupost: industry@industry.fo

*Vælkomin*

Vinarliga
Oljutingið

OLJUTINGIÐ
Petroleum Association of the Faroe Islands

Sosialurin 341800



# Tvøroyrar kvøldskúli veturin 2004/2005

**Tvøroyar Kvøld- og ungdómsskúli bjóðar í vetur hesi skeið fram**

**Frítíðarundirvísing**

| **Lærugrein:** | **Tilmelding hjá** | **Tlf.** |
|---|---|---|
| **Hondarbeiði** | Judith Holm | 371168 |
| **Seyming** | Anna Mortensen | 372810 |
| **Veving** | Óluva Joensen | 371001 |
| **Máling/tekning** | Palle Julsgart | 371669 |
| | | ella 371976 |
| **Matgerð** (Klænkikostur) | Tina Midjord | 371962 |
| **Fyrstahjálp** | Naja Mortensen | 371567 |
| **Tónleikur:** (Hornblástur) | Jens Knudsen | 223053 |
| | Tróndur Enni | 226699 |
| **Kórsangur** (Gospel) | Jens Knudsen | 223053 |
| **SRC/ROC-VHF-skeið** | Don Petersen | 218335 |
| **Undirvísing í teld:** (Tekstviðgerð) | Páll Michelsen | 371821 |
| **Venjingar í heitum vatni:** (Giktsvimjing) | Marjun Olsen | 371642 |

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning av myndugleikunum.

Tilmeldingargjaldið er 100 kr. + 3 kr. fyri undirvísingartíman.

**Tvøroyrar Kvøld- og Ungdómsskúli tlf. 371582**



# Stuðul frá Nordplus - Junior

norden
Nordplus Voksen

**Nordplus Junior er fyri fólkaskúlar og miðnámsskúlar. Hetta er frálíkt høvi at fáa norðurlendskan íblástur til skúlan og flokkin.**

Nordplus Junior er ein skipan, sum gjøgnum norðurlendskt skúlasamstarv skal menna áhugan fyri, kunnleikan um og fatanina av øðrum norðurlendskum mentanum, málum og livikorum og soleiðis styrkja norðurlendsku dimentsjónina í fólkaskúlanum og á ungdómsútbúgvingunum í Norðurlondum og teimum sjálvstýrandi økjunum, og sum skal fremja norðurlendska sambandið við støði í okkara felags norðurlendsku virðum.

Skúlar kunnu søkja um stuðul til flytføri hjá næmingum og lærarum í Norðurlondum. Tiltøkini skulu hava eitt pedagogiskt innihald og vera partur av skúlans arbeiði, og hjá næmingunum skulu tey eisini ganga fyri seg á norðurlendska skúlanetinum www.nordskol.org.

Stuðul verður veittur til trý ymisk endamál:
- Næmingaskiftið millum flokkar og bólkar
- Ferðalæraraskipanina
- Starvsvenjing fyri næmingar á yrkisskúlum

Fyri øll trý er galdandi at ferðin skal vera í minsta lagi fimm dagar við ferðadøgunum.

**Umsóknarfreistin til Nordplus Junior er 15.okt 2004 og 15. mars 2005 og 2006**

*Umsóknarfreistirnar til hinar fýra Nordplus-skipanirnar eru:*
Nordplus Vaksin - Umsóknarfreistir: 1. okt. 2004 og 1. mars og 1. okt. 2005 og 2006
Nordplus Granni - Umsóknarfreistir: 1. februar 2005 og 2006
Nordplus Mál - Umsóknarfreistir: 15. okt. 2004 og 1. februar og 15. okt. 2005 og 2006
Nordplus - Umsóknarfreistir 1. februar 2005 og 2006

Meiri fæst at vita á www.ciriusonline.dk ella hjá Altjóða Skristovan í Tórshavn. Tlf. 322065 - e-mail: ask@ask.fo - www.ask.fo

Sosialurin 341800



# Stuðul frá Nordplus - Mál

norden
Nordplus Voksen

**Nordplus Mál skal menna málfatanina og málfelagsskapin millum norðurlondini og styrkja altjóða støðuna hjá málunum.**

Nordplus Mál er ein skipan, sum er ætlað at vísa á týdningin av, at tey norðurlendsku málini verða styrkt, soleiðis at norðurlendskt samstarv eisini í framtíðini verður á norðurlendskum málum.

Stovnar, feløg og persónar kunnu søkja um stuðul til tiltøk og verkætlanir, sum fremja fatanina av norðurlendskum málum, styrkja kunnleikan um norðurlendsku málini, fremja ein demokratiskan málpolitikk í Norðurlondum og styrkja støðuna hjá norðurlendsku málunum í Norðurlondum og uttan fyri Norðurlond.

Stuðul verður latin til hesi endamál:
- Skeið og ráðstevnur
- Gransking og kanning
- Orðabóka- og terminologiarbeiðið
- Undirvísingartilfar og útgávur
- Máltøkni verkætlanir
- Uppbygging av netverkum við denti á mál og á upplýsingararbeiðið

**Umsóknarfreistin til Nordplus Mál er 15.okt 2004 og 1.febr. og 15.okt. 2005 og 2006**

*Umsóknarfreistirnar til hinar fýra Nordplus-skipanirnar eru:*
Nordplus Vaksin - Umsóknarfreistir: 1. okt. 2004 og 1. mars og 1. okt. 2005 og 2006
Nordplus Granni - Umsóknarfreistir: 1. februar 2005 og 2006
Nordplus - Umsóknarfreistir 1. februar 2005 og 2006
Nordplus Junior - Umsóknarfreistir: 15. okt. 2004 og 15. mars 2005 og 2006

Meiri fæst at vita á www.ciriusonline.dk ella hjá Altjóða Skristovan í Tórshavn. Tlf. 322065 - e-mail: ask@ask.fo - www.ask.fo





# FRÍTÍÐARUNDIRVÍSINGIN Á OYRARBAKKA VETURIN 2004/2005

| | Dagur: | Klokkan: | Undirvísari: | Telefon: |
|---|---|---|---|---|
| Motiónsfimleikur menn | Mánadag | 21.00 - 22.18 | Erling Petersen | 423194 |
| | Fríggjadag | 21.00 - 22.18 | | |
| Klænkiskeið | Mikudag | 18.30 - 22.00 | Edna Einarsson | 421289 / 217089 |
| Svimjing (byrjanarundirvísing) | Týsdag | 19.30 - 20.48 | Lisa Hendriksdóttir | 422223 / 226758 |
| Postalínsmáling | Mikudag | 18.45 - 22.15 | Eyðna Johansen | 422335 |
| Kórsangur (Sundakórið) | Mánadag | 19.00 - 22.30 | Hans Oliver Joensen | 270543 |
| Royndarskeið í dreying | Dagur og tíð ásett seinni | | Terji Johannesen | 422326 / 253409 |

Øll undirvísing er treytað av nóg stórar luttøku og góðkenning frá myndugleikunum. Luttøkugjaldið er 300 kr. fyri hvørja lærugrein, tó 500 kr. fyri motiónsfimleik menn, og tað skal verða flutt á konto skúlans nr. 6460-1001908 í Føroya Banka beinanvegin, tá ið undirvísingin er byrjað. Skúlanæmingar gjalda 30 kr. Fráboðan og nærri upplýsingar hjá faklærara.

**FELAGSSKÚLIN Á OYRARBAKKA** • TEL 422 084



# MIÐVÁGS-SANDAVÁGS KVØLDSKÚLI

Veturin 2004/2005

**Hesi tilboð verða í Miðvágs-Sandavágs kvøldskúla í vetur:**

| LÆRUGREIN | LÆRARI | TÍÐ | TILMELDING |
|---|---|---|---|
| Ítróttur/Boccia | Marin Sigvaldsdóttir | eftir avtalu | 332920 |
| Fimleikur | Hervør Jørgensen | mán./hós. kl. 18.30 | 333204 |
| Føroyskt fyri útlendingar | Hjalmar P. Petersen | eftir avtalu | 332451 |
| Føroysk rættskriving | Thurid Olsen | mikukvøld kl. 19.00 | 332820/221432 |
| Klaverundirvísing | Martin Pollard | mánakvøld kl. 18.00 | 333537/213537 |
| Klænkiskeið | Marjun í Kálvalíð | hóskvøld kl. 18.00 | 332779 |
| Felagskór | Ólavur Hátún | mánakvøld kl. 19.30 | 311819 |
| Gentukór | Ólavur Hátún | eftir avtalu | 311819 |
| Ungdómsorkestur | Steven Foggin | hóskvøld kl. 16.30 | 333362/254945 |
| Teldulæra *Byrjanarskeið*)* | Marianna Simonsen og Árni Frederiksen | mikukvøld kl. 19.30 | 332416/332968 |
| Teldulæra *Framhaldsskeið**)* | Marianna Simonsen og Árni Frederiksen | hóskvøld kl. 19.00 | 332416/332968 |
| Veving | Poulina Jensen | fríggjakvøld kl. 18.00 | 322344/212344 |
| WHF/SRC | Sámal J. Jørgensen | eftir avtalu | 332549 |
| Træsmíð | Sjúrður Guttesen | hóskvøld kl. 19.00 | 332447/255639 |
| Ferðslulæra | Jógvan Páll Joensen | eftir avtalu | 332820/229495 |
| Rytmiskur tónleikur | Hans Ravnsfjall | mikukvøld kl. 19.00 | 586058 |

Luttøkugjaldið, sum skal gjaldast fyrsta kvøldið, er:

300 kr fyri hvørja lærugrein.
Undantikið hesi reglu er skeiðið í veving, tað kostar 400 kr.

*) Telduskeiðið mikukvøld er fyri tey, sum hava nomið sær eitt sindur av kunnleika.
**) Teldukeiðið hóskvøld er fyri tey, sum lítlan og ongan kunnleika hava.

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari undirtøku og góðkenning myndugleikanna. Byrjað verður eftir avtalu.



# Starvsfólk
## til barnagarðin í Hvalvík

Søkt verður eftir tveimum pedagogum til barnagarðin.
Arbeiðstíðin er 35 tímar um vikuna.
Annað starvið verður at seta frá 01.11.2004.
Hitt starvið er tíðaravmarkað, fyri pedagog í farloyvi, frá 01.01.2005–01.09.2005.

Barnagarðurin er nýggjur og skipaður við 2 barnagarðsstovum, 2 vøggustovum og einari frítíðarstovu.
Barnagarðurin liggur í hugnaligum, barnavinarligum umhvørvi heilt oman til ta vælkendu stóru ánna, sum er ein náttúrligur partur av okkara gerandisdegi.

**Vit vilja**
- At tú hevur hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum.
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu.
- At tú hevur hug til at skapa og seta dám á okkara nýggja barnagarð.
- At tú hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um eingin pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett í størvini fyribils.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Irenu Olsen, leiðara, á tlf. 213717 ella 422717.

Umsóknir við avriti av prógvi verða at senda til:

**Barnagarðin**
Hvalvíkar Kommuna
430 Hvalvík

Umsóknarfreistin er í **seinasta lagi tann 09.10.2004.**



# Peugeot 406 Coupé



**bíliga** til sølu vegna flyting.
Árg. 2000
km. 75.000
Ring 423014 og hoyr nærri.



# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480



# TEORISKEIÐ
TIL PERSÓNBIL

**Nýtt skeið til persónbil byrjar:**
**Hósdagin kl. 18.00 á Slættanesgøtu 5, Tórshavn**

HAMMERS
KOYRISKÚLI
v/Johannus Hammer · Tel 573 940